# Innbygdan gásarhyl

**Ein kollfirðingur gjørdist ikki sørt skakkur, tá hann sá, hvussu umhugsnir-havnarmenn eru. Tá teir asfalteraðu, syrgdu teir nevniliga fyri at gera ein innbygdan gásarhyl í túnið**

GÁSARHYLUR
*eydna@sosialurin.fo*

Nú Kollafjørður er blivin ein partur av Havnini, hava havnarmenn syrgt fyri at asfaltera vegirnar í Kollafirði.

Og kollfirðingar eru ógvuliga fegnir um hesar framúr dugnaligu havnarmenn, sum av álvara hava sett seg inn í bygdamentanina og – tørvin.

Eigarin av hesi myndini vil við hesum senda eina tøkk til nýggju kommununa, og takka fyri arbeiðið. Hann hevur nevniliga fingið ein so vælsignaðan innbygdan gásarhyl í túnið.

Og gæsnar síggja eisini út til at stórtrívast.



*Kollfirðingurin gleddist stórliga, tá hann sá hvussu umhugsnir havnarmenninir, sum høvdu asfalterað har á leið, høvdu verið. Og eisini gæsnar tóktust gleðast stórliga.*

*Mynd: privatmynd*

# Kardamummu minnir í Lounge'ini

**Húsaorkestrið í Hafnia Lounge hevur sínar røtur í Kardamummubýnum, og kendu kardamummu løgini eru ikki heilt gloymd**

TÍÐINDASKRIV

Fólk og dólgar í Kardamummubýnum setti met í Sjónleikarhúsinum í vetur. Fólk fingu snøkt sagt ikki nokk av dólgunum og hinum í kardamummubýnum. Ja, Kardamummubýur er so avgjørt besta stað í verð…

Heili 62 ferðir vóru teir á palli við Fólk og dólgum í Kardamummubýnum.

Finnur Jensen, sum spældi ein av dólgunum, hevur funnið saman við tveimum av tónleikarunum, Ronni Poulsen og Julian Rasmussen og skipa ein tónleikabólk, sum javnan spælir í Hafnia Lounge.

Finnur og Ronni hava áður spælt heilt fitt saman. Teir hildu seg hava tørv á einum góðum klaverleikara, og tað var ógvuliga líkatil at spyrja Julian um at vera við. Og hann himpraðist ikki við at taka við avbjóðingini.

### Café tónleikur

Og teir duga annað og meira enn at syngja: Her í kardamummu gongur alt sum best ber til. Tí er gott og hugnaligt, og ein ger tað, ein vil...

Teir hava hvør í sær hollar royndir sum tónleikarar og eru als ikki fremmandir fyri at spæla tílík huganlig støð sum Hafnia Lounge. Tónleikurin hjá okkum kann kallast fyri café tónleik. Tað snýr seg um at spæla dygdargóðan tónleik, sum passar inn og skapar tað rætta huglagið, sigur Finnur Jensen.

Júst hetta við huglagnum er oftani tað fólk leitar sær í Hafnia Lounge eftir. Tónleikurin hjá teimum trimum hevur víst seg at passa framúr væl saman við eyðkenda hugnaliga stemningunum í Hafnia Lounge.

### Kunnu lokkast

Teir tríggir, Julian, Finnur og Ronni, eru eitt slag av húsorkestri hjá Hafnia Lounge. Teir spæla regluliga teirra væl svingandi lætta tónleik og leggja stóran dent á at samskifta við gestirnar og føla seg oftani fram, hvat er rættast at spæla, siga teir tríggir.

Og teir hava heldur ikki gloymt teirra røtur. Teir kunnu lokkast.

- Er lagið gott, so kunnu vit eisini lokkast til at spæla kardamummusangin, sigur Finnur Jensen.

Ronni, Julian og Finnur spæla í Hafnia Lounge aftur leygarkvøldið 16. apríl kl. 22:30.

VINN EINA DREYMA FÓTBÓLTSFERÐ
FYRI 2 TIL FRAKLANDS, AT HYGGJA EFTIR DYSTINUM MILLUM FRAKLAND OG FØROYAR




**Fótbóltsferðin**
Í Fótbóltsblaðnum, sum var í Sosialinum undan páskum, er ein síða, har eitt puslispæl skal setast á. Íalt verður talan um 15 puntar, sum skulu setast saman til eina mynd, og eru tveir teir fyrstu at síggja niðanfyri.
Tá allir puntarnir eru samlaðir, skulu hesir sendast Sosialinum.
**Loyvt er ikki at senda inn avrit av síðuni ella av puntunum, sum skulu setast á síðuna**

**Prekvalifisering**

**Umsiting av røkt og viðlíkahald av Vágatunlinum.**

Áhugaðar fyritøkur verða við hesum bodnar at vísa áhuga at vera við í avmarkaðari útbjóðing av umsiting av røkt og viðlíkahald av Vágatunlinum.

Prekvalifikatiónstilfarið fæst við at venda sær til skrivstovu okkara á adressuni niðanfyri, ella við at senda teldupost til drh@tunnil.fo

Freistin at lata inn umbidnu upplýsingarnar er 26. apr 2005.

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.tunnil.fo